# Føroya Skúlabókagrunnur

## STARVSLÝSING

Eitt starv sum ritstjóri verður lýst leyst í Føroya Skúlabókagrunni til setanar sum skjótast.

Starvið fevnir í høvuðsheitum um praktiskt útgávuvirksemi, ráðgeving og vegleiðing í sambandi við at geva út fjølbroyttar undirvísingarmiðlar til føroyska skúlaverkið. Ein partur av starvinum verður at kunna seg við tørv á tíðarbærum undirvísingarmiðlum, lærugreinum og undirvísingarevnum í byrjanarundirvísingini í fólkaskúlanum. Upplæring kann vera neyðug.

Ritstjórarnir á Skúlabókagrunninum eru eitt toymi, sum arbeiðir saman um at útvega so nógvar og so dygdargóðar undirvísingarmiðlar sum gjørligt til alt tað føroyska skúlaverkið. Útlit eru til, at byrjanarfrálæran fer at verða raðfest hægri, og tað er umráðandi, at undirvísingarmiðlarnir eru ein partur av hesari raðfesting. Vilt tú vera við til at menna fólkaskúlan og serstakliga tryggja, at byrjanarfrálæran fær góðar umstøður, so eru nógvar áhugaverdar uppgávur at fara í holt við.

**Førleikar**
Til starvið krevst útbúgving sum fólkaskúlalærari, í minsta lagi 5 ára undirvísingarroyndir, dyggur fakligur førleiki, tá um byrjanarundirvísing ræður, og hollur kunnleiki í føroyskum

Løn og setanartreytir

Løn og setanartreytir verða eftir sáttmála við Føroya Lærarafelag og við góðkenning Fíggjarmálaráðsins. Royndartíðin er eitt ár.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal vera Skúlabókagrunninum í hendi í seinasta lagi mánadagin tann 16. apríl 2007.

Gjølligari upplýsingar um starvið fáast frá Helenu Dam á Neystabø, tlf. 31 61 00

*Tórshavn 19. mars 2007*

**Føroya Skúlabókagrunnur**
Lützenstrøð 4
FO-100 Tórshavn



# Hús í Sørvági til sølu

Húsini eru væl røkt og í góðum standi.

Stødd: 2 x 120 fermetrar. Grundstykkið er 506 fermetrar.

Liggja í veðurgóðum umráði og tað er nosligt rundan um húsini.

Vegurin til húsini og túnið eru asfaltera. Húsini eru í tveimum eindum, alt innrættað. Kjallarin kann leigast út fyri seg, um tað skal verða.

Sera gott og frítt útsýni yvir fjørðin og vestur til Mykines.

**Kunnu yvirtakast beinanvegin.**

Tlf. 217300 · lp@ognir.fo · www.ognir.fo



## EYSTUROYAR APOTEK

# Hjálparfólk

Søkt verður eftir hjálparfólki at byrja 16. apríl 2007

Starvið umfatar dagliga reingerð á apotekinum.

Arbeiðstíðin er 18 tímar um vikuna, 3 tímar dagliga mánadag – leygardag, **uttanfyri vanliga avgreiðslutíð á apotekinum**, sum er: mánadag – fríggjadag kl. 8.00-17.30 og leygardag kl. 8.30-13

Løn sambart avvarandi yrkisfelag

Skrivlig umsókn við møguligum viðmælum skal verða apotekinum í hendi áðrenn 1. apríl 2007.

Eysturoyar Apotek
Mýravegur 6
620 Runavík

Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Jens Andrias Vinther, adv.

## Advokatskrivstovan

Fr. Petersensgøta 9
Postboks 6
110 Tórshavn

Telefon 31 11 45
Telefax 31 15 25
jura@jura.fo
www.jura.fo

# Partabræv í P/F Tvøran

Um nóg høgt boð fæst, verður eitt partabræv í P/f Tvøran, 900 Vágur selt.

Partabrævið hevur eitt áljóðandi virði á kr. 35.000,00.

***Nærri upplýsingar fáast frá***

**Advokatskrivstovuni**
Fr. Petersensgøta 9 · 100 Tórshavn
**Tel. 31 11 45**
att: Jens Andrias Vinther, adv. (jav@jura.fo)
Elsa Magnussen, skrivari (elm@jura.fo)

IRF
*– heilt og reint*

# Skrivstovufólk til umsitingina hjá IRF á Hagaleiti

**Starvið umfatar:**
- Kundaavgreiðsla
- Ordramóttøka
- Skráseting
- Fakturering
- Debitorbókhald og avstemmingar
- Aðrar umsitingarligar uppgávur

Talan er um eitt fulltíðarstarv.

Starvið er fyribils tíðaravmarkað til 31. desember 2008.

**Krøv til umsøkjaran:**
- Hevur útbúgving ella royndir innan skrivstovuyrkið
- Fyrikomandi, nærlagdur og røkin
- Skal kunna arbeiða sjálvstøðugt
- Lætt við at samskifta og góð samstarvsevnir

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til IRF á telefon **41 42 43**, Erik Lervig, fíggjarleiðara.

Skrivlig umsókn skal verða okkum í hendi innan týsdagin 3. apríl 2007.

**IRF**
**Postboks 39**
**FO-520 Leirvík**

EMERGENCY® first response

# 1.hjálparskeið

**31.mars**

**Á skeiðnum, ið verður í Eysturoy, læra luttakararnir somu mannagongdir, sum professionellir bjargarar nýta. Undirvíst verður harumframt í brúki av hjartastartara, súrevni og sálarligari hjálp á einum skaðastaði.**

**Kostnaður Kr.780,-**

**Tilmelding á tlf. 218929 el. 224224**

**WWW.FAROEDIVE.FO**
**faroedive@faroedive.fo**

## Heilsuhjálparafelag Føroya

Ársaðalfundur felagsins verður á Hotel Føroyum leygardagin tann 21. apríl kl. 10.00

Skrá sambært lógum felagsins.

***Nevndin***